# Tað skal vera góðska



*- Eitt, sum nógvir pengar hjá mær fara til, eru ymisk telduforrit og heimasíður, sum eg havi hald til. International Chess Club er eitt, og tað geri eg brúk av hvønn dag. Tvey talv um dagin, tað er fast*



skal fáa fløgur sendandi við postinum. Tað er alt ov nógv roks við tolli og øðrum roksi. Bøkur og pappír, takk. Tað sparir bæði tíð og pengar, sigur hann avgjørdur.

Fartelefonin hjá Rana liggur ikki einsamøll, gloymd í onkrum lumma. Hon er hansara trúgvi fylgissveinur.

- Eg brúki mína fartelefon til alt. Eg lesi øll bløð og tíðindi umvegis fartelefonina. Serliga BBC Mobile, Berlingske Nyhedsavis og Iværksætteren fylgi eg væl við. Harafturat brúki eg kalendaran nógv, eg leggi allar avtalur inn á kalendaran á telefonini, og so er okkurt talvforrit eisini lagt inn á telefonina. Men eg tosi vanliga ikki nógv í telefon, sigur hann og smílist.

## Familjan skal hjúklast um

Rani Nolsøe hevur alt sítt vaksna lív koyrt í Ford bili. Í løtuni hoyra tveir Ford bilar til húsið. Ein Fiesta og ein Mondeo Gia.

- Mær dámar væl Ford. Mínar royndir við Ford geva ein ávísan tryggleika, komfort og so framvegis. Men bilarnir hava onga størri raðfesting enn at teir eru transportmiðlar hjá familjuni.

Uttanlandsferðir hava heldur onga serstaka raðfesting fyri Rana Nolsøe.

- Eg havi ongantíð viljað ferðast nakað serligt. Vit hava ferðast nógv í Føroyum, og eg ferðist nakað í mínum arbeiði. Men at fara avstað sum familja eina ferð um árið, er eitt fínt hugskot.

Familjan hevur sum heild ein heilt serligan týdning, sum bara veksur og veksur við tíðini. Tí fær tað samsvarandi týdning, at privata lívið er so gott sum yvirhøvur møguligt.

- Tað er grundarlagið undir øllum øðrum.

Heima er tað sum oftast konan, sum ger mat, og stendur fyri klædnavaskinum, men restin av arbeiðnum er rímiliga felags.

- Hon hevur eitt fínt organisatoriskt talent heima, og tað seti eg prís uppá. Eg haldi, at tað er neyðugt at rudda, og taki mær av túninum, hjallinum og kjallaranum og so víðari. Hon ger sum oftast mat, men vit gera bæði klárt til døgurðan, og tað haldi eg er ein hugnalig løta. Tað er á náttúrðatíð í køkinum, meðan vit práta um hvat er hent gjøgnum dagin.

